# ir






*Endaleysa kjakið um tað skulu verða 3 sjúkrahús í Føroyum er burturspilt tíð og peningur. Tað er av stórum týdningi, at tað framyvir verða gjørdar ætlanir har øll 3 sjúkrahúsini verða tikin í álvara so at tey kenna seg trygg og soleiðis óttaleys kunnu ganga inn í eitt fruktagott samarbeiði, sigur Jákup Petersen. Her er Klaksvíkar Sjúkrahús*

ella fyri hvørja eind. Talið av sjúklingum fyri hvønn sjúkrahúslækna í Føroyum er næstan eins fyri øll sjúkrahúsini, so her skuldið ikki verið nakar trupuleiki. Tá tað kemur til struktur, kvalitet og kostnað, so hevur tað týdning at visitatiónin av teim ymisku sjúklingabólkunum verður stýrd rætt fyri at fáa sum mest burturúr.

Rakstrarliga (ikki fakliga) tykist optimala sjúkrahússtøddin at liggja millum 200 – 400 seingjarpláss. Sjúkrahús omanfyri 600 seingjarpláss eru vanliga kostnaðarmikil at reka. Hinvegin eru ringar royndir av at leggja sjúkrahús saman. Væntaðu stórrakstrar sparingarnar verða sum oftast etnar upp av óvæntaðum eykaútreiðslum og øktari leiðslu, stýring og ferðing.

Opinleiki í leiðsluni, greiðar ætlanir, tryggar kósir og klár endamál kunnu tó vekja inspiratión og fáa starvsfólk sjálvi at stýra og koordinera og sostatt sleppa frá teimum endaleysu fundunum. Hetta førir ofta til bæði sparing, effektivitet og kvalitet.

Annars ávirkast raksturin á sjúkrahúsum m.a. av, hvussu nógv gomul fólk eru í upptøkuøkinum, hvussu sosialu umstøðurnar eru, hvussu røktarumstøðurnar eru í kommununi og hvussu langt er til næsta sjúkrahús. Hetta og líknandi umstøður gera tað neyðugt, at eisini hugsa landsbúskaparliga, tá ið ætlanir verða lagdar fyri sjúkrahúsverkið.

**Vit stríðast við eina ineffektiva leiðslu á okkara sjúkrahúsum. Hon er ein leivd af fakfelagsstríði og ein forðing fyri rationellari drift av sjúkrahúsunum. Peningur fer fyri skeyti.**

At enda er tað so sjálv sjúkrahúsleiðslan, sum kann liggja í buktini. Fylgjandi í fótasporunum hjá ávísum grannalondum og grundað í ítøkiligum leiðslutrupulleikum á Landssjúkrahúsinum, varð Dansk Institut for Organisations Studier, eisini kallað, DIOS, biðið at gera eina kanning av leiðsluskipanini á Landssjúkrahúsinum.

Teir komu við eini heilt greiðari niðurstøðu og gjørdu eitt sera greitt og framskygt tilmæli, **sum síðani ikki varð fylgt!**

Sjúkrahúsið (og seinri alt sjúkrahúsverkið) skuldið leiðast av einum sjúkrahússtjóra og einum varasjúkrahússtjóra. Undir hesum, skuldu verða 4 deplar harav 3 skuldu leiðast av læknum, styrktir við 3 yvirsjúkrasystrum viðvíkjandi røktini. Tann fjórði og sokallaði, servisudepilin, skuldið leiðast av búskaparfrøðingi.

Sum kunnugt sá henda skipan ikki dagsins ljós orsaka av fakfelagsstríði, og fallið varð aftur í eitt slag av súluskipan, har ein broytt depilskipan var sett í verk, meðan ovasta leiðslan varð mannað við einum lækna, einari sjúkrasystur og einum sjúkrahússtjóra. Hetta er meira ella minni tann sokallaða troykaleiðslan, sum illa fæst at fungera nakra aðrastaðni. Og hon hevur heldur ikki fungerað hjá okkum.

Úteftir letur leiðslan vita, at hon arbeiðir sum ein eind, men inneftir er tað sum tað altíð hevur verið við troykaleiðslum. Hvør leiðslulimur roynir í sínum lagi at leggja inn undir seg umráði at ábyrgda, seta seg sjálvan sum formann fyri nevndir, fegnast um, at trupulleikar eru sum ein sjálvur kann “loysa”, skapa sær vald og ávirkan við at spjaða og ráða, samstundis sum skaptir verða fleiri trupulleikar enn teir sum verða loystir.

Á henda hátt kunnu tey einstøku í leiðsluni fáa makt og ávirkan. Tílíkt hevur m.a. ført við sær, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum í stóran mun ikki hevur tikið sær nóg mikið av málum, sum hon fyrst og fremst eigur at taka sær av, nevnliga búskapi, lønum, sjúklingahagtølum, kvalitetstrygging, rokniskapi, innkeypi o.s.fr.

Eg kann fara skeivur, men eg haldi ikki at Landssjúkrahúsið hevur hildið eina einastu játtan seinastu mongu árini. Hetta sjálvt um tað, ár undan ári, hevur fingið økt um játtanina.. Ístaðin fæst hon við smálutir á sjúkrahúsinum, sum áttu at verið útdelegeraðir til sjálvstøðugar persónar, bólkar, nevndir, deildar- og depilsleiðslur. Við eini tílíkari leiðsluskipan er framburður útihýstur.

Tørvur er á at fáa eina meira framkomna fyrisitingarliga skipan sum tað, sum nevnd er í DIOS-rapportini. Tørvur er eisini á at miðspjaða kompetansu, at loysa mál heilt úti á deildunum og í deplinum, at útbúgva deildarleiðsluna og geva tí komandi stjóraskrivstovuni møguleika at menna fyrisitingina.

Hetta fer so eisini longri fram at føra øll 3 sjúkrahúsini undir sama stjórahatt og fáa deplarnar at gjalda fyri øll 3 sjúkrahúsini, og harvið eisini tryggja tey smáu sjúkrahúsini.

**Endaleysa kjakið um tað skulu verða 3 sjúkrahús í Føroyum er burturspilt tíð og peningur.**

Tá tað kemur til talið á sjúkrahúsum í einum landi, so er hetta eisini sera individuelt og kann ikki dikterast útfrá sammeting við nakað einstakt land. Åland hevur 3 sjúkrahús, Svøríki hevur 97, Danmark hevur 96, Grønland hevur 16, Finland hevur 340 og Ísland hevur 27 sjúkrahús.

Skuldu vitt mett okkum við Åland so skuldu vit havt 5 sjúkrahús men sammetingin við Svøríki skuldi givið okkum 0,5 sjúkrahús í Føroyum.

Sammett við Danmark skuldu vit havt eitt, sammett við Grønland skuldu vit havt 13, sammett við Finland skuldu vit havt 3 og sammet við Ísland so skuldu vit havt 5 skúkrahús í Føroyum.

Vit hava 3 sjúkrahús og tað er lógarfest. Um hesi sjúkrahús skulu virka sum sjúkrahús, mugu tey hava funktiónir sum gera tað áhugavert hjá yvirlæknum at arbeiða har. Higartil hevur verið lítið hugsað um at styrkja henda partin.

## Í Sosialinum í morgin

### Tveita pengar út ígjøgnum vindeygað

Okkara sjúkrahúsverk hevur nú eina játtan sum er á leið við okkara grannalond. Skulu vit nú blint játta meira pening? Higartil hevur økt játtan frá politikarum hafturat í summun førum verið brúkt til onnur endamál enn ætlað varð, sigur Jákup Petersen, yvirlækni